Fróðskaparsetur Føroya

30. september 2005

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 8/2005

Tíð: Hósdagin 29. september 2005, kl. 13.00-15.00

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Eivind Weyhe, megindeildarráðsf. fyri FMD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 7/2005 setursráðsfundi 1. september 2005.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarløgtingslógin 2006.** (J.nr. 0015-01595). Serligur fíggjarfundur var um FL 2006 14. september. Tá vóru ábendingar um, at Setrið fór at fáa nýggjar pengar til KT-kjarna og til løgfrøði. Avtala var tá gjørd um eina arbeiðsætlan, um játtanin hækkaði. Síðani eru nýggj signal komin um, at játtanin ikki hækkar kortini. Setursráðið samt um at halda fast við ætlanina frá fundinum14., um nýggj játtan er tøk. Verður játtanin tann sama sum í 2005, er bara peningur til verandi virksemi.
Setursskrivarin boðaði frá, at endaligt býti fyri 2005 skal gerast á komandi setursráðsfundi. Deildirnar verða bidnar um at dagføra tølini, neyvari boð verða givin í komandi viku.

4. **Mentamálaráðið biður Fróðskaparsetrið velja umboð í arbeiðsbólk, sum skal gera fyrireikingararbeiðið til eina Masterútbúgving í KT og læring. Við í arbeiðsbólkinum verða umboð fyri Mentamálaráðið, Føroya Handilsskúla, Føroya Læraraskúla og KT-deplinum.** (J.nr. 0011-01702). Samtykt at Hans Pauli Joensen umboðar Fróðskaparsetrið. Setursskrivstovan svarar Mentamálaráðnum.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

5. **Mentamálaráðið setir málkommissión, sum skal lýsa støðuna hjá føroyska málinum og gera uppskot til ein almennan føroyskan málpolitikk, við einum umboði frá Føroyamálsdeildini, einum úr Málnevndini, einum úr Móðurmálslærarafelagnum og tveimum, sum landsstýrismaðurin velur. Føroyamálsdeildin skal velja umboð.** (J.nr. 0011-1703). Samtykt at fylgja tilmælinum hjá Føroyamálsdeildini um at Eivind Weyhe umboðar Fróðskaparsetrið. Setursskrivstovan svarar Mentamálaráðnum.

6. **Áheitan frá Turið Sigurðardóttir um at Fróðskaparsetrið bjóðar døgverða á ársfundinum hjá universitetssamstarvinum Nordliks "Nordiske litteratur- og sproginstitutter", sum deildin skipar fyri í døgunum 18.-19.11.05.** (J.nr. 00056-01701). Góðkent. Setursskrivstovan ger nærri avtalu við Turið Sigurðardóttur.

7. **Leinging av starvssetan hjá Una K. Petersen.** Eftir tilmæli frá NVD samtykti setursráðið at leingja setanina hjá Una K. Petersen til 31.12.05. Avtala verður gjørd um arbeiðsætlan, sum skal góðkennast av megindeildarleiðaranum.

8. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
   a. **Fundur á Náttúruvísindadeildini 16.9.05.** (J.nr. 0011-00013). Nøkur mál fingu drúgva umrøðu, men annars einki at leggja afturat.
   b. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 22.9.05.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

9. **Góðskriving. Føroyamálsdeildin mælir til, at Kára Heinesen fær góðskrivað *Granskingarsøgu 10 ECTS,* sum hon hevur tikið eftir Cand.phil.lestrarætlanini, á B.A.lesturin. At staðfesta.** (J.nr. 0045-01688). Staðfest

10. **Heimasíðupolitikkur og reglur. Uppskot 15.9.05 at staðfesta.** (J.nr. 0018-01627). Staðfest.

**Kunningarmál:**

11. **Mánaðarjavni ultimo august 2005, nýtsla fyri alt setrið 11.810.000 kr = 61,9% av játtanarkarmi uppá 19.070.000 kr.** (J.nr. 15-01365).

12. **Álendska mentanarnevndin vitjaði Fróðskaparsetrið tann 2. september saman við løgtingslimum, umboði frá Løgtingsskrivstovuni og formanninum og stjóranum fyri Granskingarráðnum. Rektarin og setursskrivarin tóku ímóti. Gávur frá álendsku mentanarnevndini: Bóklingurin *Åland, Kort & Gott* og frímerkjaárbókin *Åland 2004.*** (J.nr. 0019-01673).

13. **Smápartafelagið Fróðskapur sp/f við undirheitinum Faroe University Press er stovnað tann 15.9.05, endamál felagsins er at reka vísindaligt útgávuvirksemi. Í nevndini eru Andras Mortensen, formaður, Petur Zachariassen, næstformaður og Annika Sølvará. Nevndin hevur sett Anniku Sølvará sum stjóra felagsins.** (J.nr. 0092-01121).

**14. NUAS-seminar í Odense 13.-14.11.05 "Det Internationale Universitet, Konsekvenser og Udfordringer".** (J.nr. 0014-01691).

**15. Frágreiðing og bókin *The First Peoples of Europe* frá Chiaki Kaiho úr Japan, hon hevur grein um Føroyar í bókini. Chiaki fekk námsferðarstuðul í 2001, hevur verið á summarskeiði á Føroyamálsdeildini og er nú studentur á deildini.** (J.nr. 0071-00350).

**16. Útgávur:**

   a. **Ársfrágreiðing 2004, Dátueftirlitið**
   b. **Åbo Akademis Årsberättelse 2004**
   c. **Umhvørvi og oljuleiting, Umhvørvislig krøv og kanningar á føroyskum øki, Heilsufrøðiliga Starvsstovan og FOÍB 2005.**
   d. **Magasinet Humaniora 3/2005, evni: Designforskning, Cultural Planning, James Joyce og Danmark. Forskningsrådet for Kultur og Kommunikation.**

Frágreiðing: Annika Sølvará